gult cyan magenta svart



Sp/f
ADC-Heilsølan

Alt til persónliga trygd:

HANDSKAR
TRYGDARSKÓGVAR OG -STIVLAR
REGNKLÆÐIR
VATNTÆTTAR TERMODRAKTIR
ARBEIÐSKLÆÐI
UNDIRKLÆÐI

VIT ERU Á BÁSI 11

ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
abc@post.olivant.fo

SCANVÆGT
bjóðar
vælkomin til
'2000
VØRUMESSAN
8. - 10. september
Básur nr. 17
SCANVÆGT
SCANVÆGT A/S
Vesturgøta 2
FO-100 Tórshavn
Tel. 315905
Fax 318500

BÁSUR NR.20



LEIFTUR
OLJUDANSAR
OLJUJAKKAR
OLJUBUKSUR
SVINTUR
ERMAR
KITLAR
BJÁLVATROYGGJUR
BJÁLVAHETTUR
BJÁLVAHOSUR
KETILDRAKTIR
TJÓVELDSBLUSUR
ARBEIÐSBUKSUR
REGNÚLPUR

Sp/f. Sjóklæðir
TIL FØROYINGIN SÍÐAN 1964

Heilsøla
við kortum

Innbjóðingarkort
Gávukort
Borðkort
Brúdleypskort
Gull- og silvurbrúdleypskort
Føðingardags- og barnakort
Dóps- og konfirmatiónskort
Jólakort

Básur nr. 10
EB-Heilsølan
Heinagøta 14 • 100 Tórshavn • Tel./Fax 315090

Sosialurin - 311820

VØRUMESSAN '2000
VIT SÍGGJAST Á VØRU-MESSUNI 2000
VØRUMESSAN '2000



# Vistfrøðiligur landbúnaður

*Tað var í 1998, at Vottunarstofan TÚN í Íslandi tók stig til at dagføra tann íslendska Økoligiska Standardin. Føroyar og Grønland hava ikki slíkan standard. Ísland tók stig til at bjóða Føroyum og Grønlandi við í eitt samstarv um hetta evni.*

Gunnar A. Gunnarsson projektleiðari fyri TÚN heitti á L/F Meginfelag Búnaðarmanna um at finna útav hvussu Føroyar kundu verða umboðaðar. MBM byrjaði samstarvið og heitti síðani á undirritaða Bjørn Patursson, um at taka sær av samstarvinum.

Samstarvið er fíggja við at londini sjálvi gjalda eina góða helvt meðan NORA fíggjar 49 prosent. Føroyska fíggingin kemur frá MBM og Føroya Jarðarráði. Ætlanin er at søkja stuðul til útgávu av faldarum o.tl. frá áhugabólkum.

Samstarvið er býtt í tvinnar partar. I og II. Fyrsti partur verður nú avsluttaður við útgávu at trimum faldarum á føroyskum máli. Einum høvuðsfaldara sum er leiðbeinandi um hvussu vátta verður, at vøra er vistfrøðilig og um hvussu ein ger seg til reiðar at fara undir vistfrøðiliga framleiðslu og til at fáa váttan. Hinir báðir faldararnir snúgva seg um vistfrøðiligt seyðahald og ullaframleiðslu, sum vit halda í fyrstu atløgu er tann vinnugreinin innan landbúnaðin, sum lættast er at fara undir.

Tað er í sambandi við avslutningin av I. parti at projektleiðarin Gunnar A. Gunnarsson frá Vottunarstofuni TÚN í Íslandi kemur á vitjan í Føroyum. Vitjanin verður í døgunum 13. til 20. september. Skráin inniheldur í høvuðsheitum vitjanir á bóndagørðum, hjá fyritøkum og stovnum sum kunnu hugsast fáa tilknýtið til framleiðslu og handil við vistfrøðiligum vørum, eins og ætlanin er finna stovn/persón sum í framtíðini kann útbúgvast til "inspektør" ella góðkennara tá framleiðarar (bóndur) og framleiðslufyritøkur og handlar skulu góðkennast eftir møguliga Føroyskum standardi. Á vitjanini er eisini ætlanin at gera eina ella fleiri royndargóðkenningar av áhugaðum framleiðarum (bónda), um nakar finst sum hevur áhuga.

Projektbókurin skal somuleiðis halda fund um framhaldandi samstarvið í parti II sum so smátt er farin í gongd og væntandi kemur at strekkja seg til seinna partin av 2001.

# Rituvíkingur í útlegd sýnir fram í Smiðjuni

*Týsdagin 12. september letur útlagni rituvíkingurin Erik Olsen upp áhugaverda og forvitnisliga framsýning í Smiðjuni í Lítluvík í Havn.*

Úrvalið á framsýningini er breitt og fevnir um prýðislutir og brúkslist úr kopari, stáli, granitti og øðrum tilfari. Samanlagt er talan um yvir 50 lutir, ymiskligir í bæði skapi og vavi, ið verða sýndir fram undir merkinum »Erik Olsen Design«.

Erik Olsen er føddur og uppvaksin á Líðini í Rituvík, har hann var borin í heim í 1931 sum triðyngstur av ellivu systkjum. Síðani 1956 hevur hann fyri tað mesta búð í Íslandi og Danmark, síðstu fimtan árini í Esbjerg.

Í uppvøkstrinum ráddi um at læra at standa á egnum beinum í øllum viðurskiftum, og at duga handverk av ymsum slagi var at kalla ein grundleggjandi treyt í gerandisdegnum.

Longu á ungum árum fekk Erik áhuga fyri meira listarligum handverki, og 24 ára gamal evnaði hann úr messingi fleiri hondgjørdar lutir — væl hjálptur av pápanum Hendrik á Líðini, ið var tiltikið fittur í hondunum.

### Áhugin kyknaður aftur

Við árunum er áhugin fyri listarliga handverkinum kyknaður aftur, kanska ikki minst gjøgnum arbeiðið sum faklærdur bilbyggjari, og síðstu 10-15 árini hevur Erik Olsen soleiðis miðvíst arbeitt við at gera ymsar lutir úr komprimeraðum stáli og kopari og granitti.

Mangan kunnu ganga upp í ár frá hugskoti til endaligt úrslit, og gjarna leggur Erik stóran dent á, at skap, litir og funktión skulu ganga upp í eina hægri eind, samstundis sum handverksliga dygdin hevur nógv at siga.

So líðandi hevur talan verið um alsamt størri lutir, og »Erik Olsen Design« fevnir í dag um alt frá fleiri røðum av ljósastakum og skálum til borð, stólar og spegl, har omanfyri nevnda tilfar gongur sum ein reyður tráður gjøgnum øll listaverkini.

Seinnu árini hevur Erik Olsen sýnt fram listaverk síni einar tvær til tríggjar ferðir um árið. Hann hevur sýnt fram í Rosendal Kunsthandel í Århus, Føroyingahúsinum í Keypmannahavn, á framsýningum hjá listafelagnum í Ribe amti, umframt á mongum bókasøvnum og peningastovnum.



Fyri tveimum árum síðani var Erik við á framsýningini »Hendur og hugflog« í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn, og nú vitjar hann so aftur — hesa ferð við egnari framsýning í Smiðjuni í Lítluvík, har hann leggur dent á at vísa eitt breitt úrval av øllum tí, hann hevur greitt úr hondum.

Framsýningin letur upp týsdagin 12. september kl. 17, tá bygdamaðurin hjá Eriki, Hans Tausen Olsen, býráðslimur í Runavík, fer at seta framsýningina. Síðani verður framsýningin opin í tvær vikur, til sunnudagin 24. september, hvønn dag frá kl. 14 til 20.

# Inngongdin hjá vinnulívinum

*Vinnudeildin á Føroya Tele tekur sær fyrst og fremst av vinnulívskundunum, sum navnið eisini ber boð um*

Stefan í Skorini

Fyri at viðskiftafólk ikki skulu renna frá Peri til Pól á Føroya Tele, so kann alt fáast á einum stað á vinnudeildini, sum veitir loysnir á øllum økjum.

Føroya Tele hevur seinastu tíðina styrkt um vinnudeildina við fleiri starvsfólkum. Virkisrágevararnir eru ein týdningarmikil partur av deildini, og teirra uppgáva er at veita vinnulívskundum ráðgeving.

Á vørumessuni verður møguleiki hjá teimum vitjandi at royna útgerðina. Tað er fyrst og fremst digitalir vekslarar, sum verða sýndir fram. Hesir geva m.a. møguleika fyri tráðleysum sambandi millum bygningar.

Framyvir fer vinnudeildin eisini at geva aðrar meira smidligar loysnir innan datasamskifti. Her er talan um Frame Relay, sum er meira smidligt datasamskifti.

# Alt innanveggja

*Inventartænastan kann veita viðskiftafólki sínum alt, sum tørvur er á innanveggja*

Stefan í Skorini

Tað, sum inventartænastan leggur størst dent á dagliga, er skrivstovuhandils- og goymsluinnbúgv. Tað verður eisini fyrst og fremst slíkt innbúgv, sum verður sýnt fram á vørumessuni.

Harumframt verður eisini møguleiki at síggja alt tilhoyr til handlar og skrivstovur, sum inventartænastan hevur at bjóða. Til ber at síggja framsýningina hjá inventartænastuni í hølum teirra við Heygsvegin.

Annars hevur inventartænastan fleiri onnur sløg av innbúgvi, og til ber at fáa alt, sum tørvur er á innanveggja í einum handli ella eini skrivstovu, eisini øll smáting á økinum.

Eisini útvegar inventartænastan klædnaskáp til starvsfólk og innbúgv til skúlar sum talvur o.t.

Inventartænastan byrjaði virksemi sítt í 1990. Fyrst varð hildið til í R.C. Effersøesgøtu, men fyri trimum árum síðani varð flutt í hølini við Heygsvegin. Núverandi eigarin er Jørgin Petersen, og trý fólk arbeiða hjá inventartænastuni.

# Hildið turt síðan 1963

*P/F Sjóklæðir í Klaksvík er ein av teimum fáu fyritøkunum á vørumessuni, sum sjálv framleiðir sína vørur*

Stefan í Skorini

Í 37 ár hevur P/F Sjóklæðir framleitt oljuklæðir. Tey eru fyrst og fremst ætlað arbeiðsfólki í fiskivinnuni, har tað serliga er umráðandi at halda seg turran.

Sjóklæðir framleiðir mest oljuklæðir til sjómenn, men eisini onnur sløg av klæðum verða framleidd. Tað eru svintur, kitlar o.a. til fiskavirkir. Eisini ber til at fáa ketildraktir frá Sjóklæðum.

Fyritøkan hevur ikki gjørt serliga nógv við marknaðarføring tey seinastu árini, men á vørumessuni fara tey at hava eina framsýning við teimum flestu vørunum, sum tey hava at bjóða.

Seks ársverk eru í Sjóklæðum, og tað eru fleiri av teimum somu, sum hava verið har í nógv ár.

Fyri kortum hava tey havt fyrispurningar úr Íslandi um at innflyta og selja teirra vørur, og teir møguleikarnir verða kannaðir í løtuni.

gult cyan magenta svart